
Fylgiskjal 2: Prosjektuppskot (upprunaligt)



BÝLINGUR

HEIM í HAVN TIL BØRN OG UNG VIÐ AUTISMU

PROSJEKTUPPSKOT

KONTRAST
Byggilist & byggifrøði

INNIHALD

EIN BÝLINGUR IÐ FEVNIR OG VERJUR 5

inngangur 7

BYGGILIST - SKAP OG VIRKI 8

føroysk staðarnøvn 8

lendið og umhvørvið 11

skap fylgir virki 12

býlingar 13

BYGGILIST OG AUTISMA 15

autisma og umhvørvi 15

fleirivirknisveggurin 17

garðarnir - hugró 19

TEKNINGAR 21

ark - kontrast 21

kon - hmp consult 37

hvs - pb consult 41

el - Ibf 51

SAMSVAR VIÐ BYGGISKRÁNNA 55

leiðreglur 55

Hølisskrá 57

KOSTNAÐARMETING 61

EIN BÝLINGUR IÐ FEVNIR OG VERJUR


Tríggjar eindir í einari heild.

Høvuðsendamálið við býlinginum er at skapa eitt umhvørvi, ið hóskar til børn og ung við autismu.

Býlingurin er grundaður á hugsjónina um at fevna og verja íbúgvarnar í einum virkisgrundaðum, tryggum og heimligum umhvørvi.

Íblásturin er ein samanrenning millum tað siðbundna japanska húsið, við opið í miðjuni til garðar, og tær miðal eldru føroysku staðsetingarnar, eyðkendar av smáum timburhúsum við flagtekju.

Sniðið er er grundað á tað einfalda ferhynta skapið.





Inngongd / 3D frá skipanaruppskotinum

EIN BYGNINGUR IÐ FEVNIR OG VERJUR
Inngangur


Býlingurin til børn og ung við autismu er tann fyrsti av sínum slag í Føroyum. Ynskið er at skapað eitt umhvørvi, ið tekur serligt atlit og støði í teimum, sum hava autismu. Áður hava menniskju við autismu verið til umlætting og viðgerð á skúlanum á Trøðni og sum partur av øðrum eindum í røktarskipanini. Búfólk hava verið hýst í sethúsum kring býin og umstøðurnar hava ikki verið nøktandi til tað røkt og venjing, ið tey hava tørv á. Autisma er ein skerd menningartilgongd, sum vísur seg um trý ára aldur men ógvuliga ymiskt er hvussu menniskju við autismu eru fyri. Nøkur eru so sansaviðbrekin at tey illa tola ljós og ljóð. Onnur eru betur fyri og hava góðar møguleikar at menna seg sosialt og kroppsliga, við námsfrøðiligum venjingartilgongdum.
Býlingurin skal tískil nøkta bæði teimum, ið eru sera illa fyri og teimum, ið koma til umlætting, venjing og í frítíðarskúla. Virkniseindin er miðdepilin fyri menningartilgongdir og venjingar og møguleiki skal vera at arbeiða við menningartilgongdum í ymiskum stigum, soleiðis at støði kann takast í hvørjum einstøkum.

Í einum størri høpi, er býlingurin eisini ein av teimum fyrstu av sínum slag. Autisma er ein lutfalsliga nýggj sjúkuavgerð og góðar umstøður til menniskju við autismu eru altavgerðandi fyri teirra sálarheilsu, orkuró, miðsavnan og trivna sum heild. Flestu lond hava ikki enn bygt býlingar til menniskju við autismu, tó at nakrir tílíkir bygningar eru at finna. Granskað hevur seinastu árini verið í sniðgeving til umhvørvi fyri menniskju við autismu og tekur hendan ætlan støði í hesari vitan. Serliga hava sjey lyklaroð vegleitt sniðgevingargongdina:

1. Ljóð
2. Skipan av rúmi
3. Tryggleiki í rúmi
4. Greið skildran av rúmi
5. Skiftisøki 6. Sansaøki og 7. Verja og tryggleiki
   (ASPECCT Desing Index)

Býlingurin til børn og ung við autismu er eitt úrslit av samanrenningini millum virknistørv og tí arkitektonisku tulkingini av hvussu virkni og heim kunnu koma saman í eina heild, har lyklaorðið er tryggleiki.

Myndasamklipp





Niðri í Húsi, Koltur



3D av Býlinginum



Siðbundni japanski garðurin



FØROYSK STAÐARNØVN

Við tí endamáli, at skapa eina heimliga kenslu, eru ymisku partarnir av býlinginum navngivnir eftir eldru føroysku staðarnøvnum. Búsetingin Niðri í Húsi í Koltri er brúkt sum hugsjónarligt grundarlag fyri teimum heitum, ið skulu brúkast í býlinginum.

Heimrustin
Á heimrustina kundu bóndir byggja hjall, hoyhús, skera torv og so framvegis. Vanliga gekk nógv av innangarðs virkseminum fyri seg á heimrustini. Heimrustin varð arbeiðsstað tætt við upprunabúsetingina í bygdini og varð ein miðdepil hjá bygdafólkinum.


Staðsetingarheiti
Vanliga taka heitini á staðsetingunum støði í upprunabúsetingini. Upprunabúsetingin varð oftast uppfatað sum heimagarðurin, og búsetingarnar, ið koma aftaná, verða ofta nevndar Uppi við og Niðri við, ella Omanfyri og Niðanfyri, í mun til upprunabúsetingina.

Ættirnar
Vanligt var eisini at brúka ættirnar sum staðsetingarheiti. Tá var miðjað eftir hvørt staðið lá eystanfyri, vestanfyri, norðanfyri ella sunnanfyri fjall ella á.


Tún
Tún er eitt gamalt føroyskt orð og vanliga verður brúkt um eitt lítið slætt uttandura øki, framman fyri eina búseting.

Torg
Torgið er staðið í bygdini, har fólk samlast. Eldru føroysku búsetingarnar høvdu ikki torg men brúktu túnini. Torg er tó heilt vanligt í londum kring okkum og er heiti, ið er komi til Føroya í nýggjari tíð.

Skot
Eitt skot sipar til eitt stað, har tveir veggir koma saman. Hetta kann bæði verða inni og úti.



Tekning av búseting í Koltri og staðarnøvn


Garðar
Úti á fløtum
Vestara tún
Eystara tún
Vestara skot
Eystara skot
Torgið
Úti í bø
Gøtan
Staðarnøvn í Býlinginum



Bygningur í lendi - luftmynd / 3D frá skipanaruppskotinum

LENDIÐ OG UMHVØRVIÐ

Byggiøkið á matrikkul nummar 56a á Argjum er eitt stórt grundøki á 10.640 fermetrar, ið strekkir seg eystureftir og vestureftir.
Øki er eitt stórt grønt øki við gamla vegin niðan á Hamarin. Vegurin er í dag stongdur og lítil ferðsla er á økinum. Harafturímóti er nógv ferðsla omanfyri grundøki, ið viðførur nakað av larmi. Tískil er týdningarmikið at nýta tilfar, ið doyvir ljóðið.

Ein gongugøta frá Hamarinum førir ígjøgnum øki, og er hetta ein først gonguruta hjá fólki, ið búgva á Hamarinum. Tískil skal gøtan eisini verða partur av sniðgevingini av bygninginum.

Lendið á økinum er sera bratt, ið kemur at skapa hæddarmun frá lendi til bygning. Teir ymisku bakkarnir á økinum kunnu vera við til at skapa góð og mennandi uttandura øki til borgararnar í nýggja býlinginum.

Frá økinum er útsýni yvir bæði land, bý, hav og fjøll, ið ger tað til eitt sera gott umhvørvi til endamálið. Umhvørvið er opið og frítt, og seyður hoyrist skamt burturfrá - friður og tryggleiki valdar á staðnum, uttan at tað er avbyrgt.

Niðanfyri økið eru góð parkeringsviðurskifti, og til ber at ganga beinleiðis niðan á Glyvursvegurin.



Luftmynd av grundstykkinum og umhvørvinum



Mynd frá grundstykkinum

Konsept - skap fylgir virki

Grundað á byggiskránna, er býlingurin býttur upp í tríggjar høvuðseindir:

- **Búeindin**, ið skal rúma seks íbúðir, ein køk, eitt vaktrúm, ein dur og eitt felagsøki, til seks búfólk ið støðugt koma at búgva har.


- **Umlættingareindin**, ið skal rúma seks íbúðir, ein køk, eitt vaktrúm, ein dur og eitt felagsøki, til borgarar ið koma inn at búgva uppá skift.

- **Virkis- og starvsfólkaeindin**, sum útyvir at rúma umsiting, skal virka sum ein frítíðarskúli til sekstan borgarar, innrættað við sansarúmi, vatnavirksemi, ítrivs- og venjingarrúmi, teldurúm og felagsøki.


Skapið á býlinginum er grundað á smáar ferhyrningar, staðsettir í eitt netmynstur. Hvør ferhyrningur eyðlýsur hvørt virki í hvørjari eind, har støddirnar eru ásettar út frá byggiskránni.

Við at staðseta virkini í hvørjari eind inn í netmynstrið, vórðu tríggir sjálvstøðugir formar skaptir. Hesar formar, ið eyðlýsa hvørja einstøku eind, renna saman aftur í eitt heildarskap, ið eyðlýsur ein samlaðan býling.


Við íblástri frá siðbundna japanska húsinum, hevur hvør eind í býlinginum ein opnan garð í miðjuni. Á hendan hátt ber til hjá íbúgvum og brúkarum at njóta náttúruna, ið einum minni og meira vardum umvhøvrvi, í einum størri høpi.




Eindirnar, býlingurin skal rúma




Netmynstur




Virkini frá hvørjari eind verða sett upp í netmynstrið



Virkini skapa tríggjar formar




Formarnir verða samansettir til ein býling



Ein garður verður settur í hvørja eind fyri at fáa meira ljós inn, og at skapa eitt sansastimbrandi og vart øki inni

BYGGILIST - SKAP OG VIRKI
Konsept - Skap fylgir virki



EYSTARI BÝLINGUR - HEIMRUST - VESTARI BÝLINGUR

Býlingurin er samansettur av trimum høvuðseindum: Heimrust, Eystari Býlingur og Vestari Býlingur. Nøvnini á høvuðseindunum endurspegla bygnaðin á eini eldri føroyskari staðseting.

Í býlinginum verður Heimrustin brúkt sum virkiseind, og er Heimrustin eindin ið knýtir saman býlingin. Høvuðsinngongdirnar í býlinginum eru í, ella nær Heimrustini: ein eystarumegin, ein vestarumegin og ein í miðjuni. Tvørtur ígjøgnum heimrustina er ein gongd, gøtan, ið knýtir saman eystara og vestara part av býlinginum. Hjartað í Heimrustini er garðurin, ið byggir seg upp ígjøgnum tekjuna.

Búeindin verður kallað Eystari Býlingur, og eisini her er ein garður í miðjuni av uppihaldsøkinum, eisini nevnt Eystara Tún (sí tekning á síðu 9).

Umlættingareindin verður kallað Vestari Býlingur. Hesin parturin verður brúktir til teirra, ið koma til umlætting á staðnum, og er eisini ein garður í miðjuni, ið skapar hugró og stimbran.



Uppihaldsøki í búeindini / 3D frá skipanaruppskotinum

AUTISMA OG UMHVØRVI

Heitið autisma er eitt felagsheiti fyri fleiri ymiskar skerdar menningartilgongdir. Menniskju við autismu eru tí líka ymisk sum øll onnur. Sermerkið fyri autismu er skerd menningartilgongd í samband við at viðgera umhvørvisligan og sosialan stimulans. Hetta merkir, at tey flestu menniskju við autismu eru ógvuliga sansaviðkom. Tískil hava tey tørv á, at umhvørvið tey liva í, er væl skipað.

Samstundis er týdningarmikið at stimulansur er partur av gerðandisdegnum hjá menniskjum við autismu, soleiðis at møguleiki er at arbeiða við menningartilgongdum. Byggilist til menniskju við autismu skal tískil eyðkennast av skerming frá ovurhonds sansainntrykkum, so sum nógvum larmi og stórum opnum rúmum við nógvum fólki, og heldur rúma sansastimulering í tí stilla - so sum grønar garðar, spælipláss og sansarúm, ið eini skipaðari tilgongd.

Býlingurin skal upplivast sum eitt verndarumvhørvi, har rúmini eru einkul í sniði, tó samstundis hugnalig og heimlig. Býlingurin til børn og ung við autismu skal verða eitt umhvørvi, ið fevnir og verjur.

Býlingurin er eitt úrslit av teimum treytum, ið virkistørvurin setur fyri eitt heim til børn og ung við autismu, og tí byggilistarligu tulkingini av hvussu virkni og heim kunnu renna saman í eina heild, har tryggleiki er lyklaorðið.

Tá ið ein bygningur til børn og ung við autismu skal sniðgevast, eru hesi sjey lyklaøkini sambært ASPECCT Design Index týdningarmikil at hava í huga:

1. Ljóð
2. Skipanarrøð av rúmi
3. Tryggleiki í rúmi
4. Greiða skildran av rúmi
5. Skiftisøki
6. Sansaøki
7. Verja og tryggleiki

> “For autistic individuals, feeling calm and relaxed can be the di□erence between being able to successfully engage with the world around them versus a meltdown. This line of thinking is very di□erent from the kinds of therapies to try and change the autistic individual to fit in with their environment.”
>
> Dr. Jason Nolan, University professor and autist.



Gongd- og uppihaldsøki í búeindini */ 3D frá skipanaruppskotinum*

FLEIRIVIRKNISVEGGURIN - STIMBRANDI OG SKERMANDI

Sum ein partur av sniðgevingini er ein fleirvirknisveggur settur inn í býlingin í øllum trimum eindum. Veggurin er hugsaður sum eitt møbul, ið skal binda saman tær tríggjar eindirnar, við at skapa ymisk mennandi og fevnandi umhvørvi ígjøgnum allan býlingin. Hetta viðførur millum annað, at allar gongdvíddir í bygninginum ikki bara gerast eitt gjøgnumgongdarøki, men eisini virka sum eitt stimbrandi øki har børnini kunnu uppihalda seg.

Fleirvirknisveggurin gevur alskyns virkismøguleikar, ið kunnu flokkast í tríggjar høvuðsbólkar: Fyrsti bólkurin er uppihald, har møguleiki er fyri at seta seg í klivar ella hol. Annar bólkurin gevur virknismøguleikar, so sum at klintra upp eftir veggi og sansaupplivingar. Triði bólkurin er virkisbundin, t.e. goymslurúm av ymiskari stødd, ið eisini kann nýtast til tøkni. Veggurin er úr ljósum viði ið gevur hita og hugna til umhvørvið.

Útyvir at innihalda ymisk virki, kann fleirvirknisveggurin nýtast sum skerming inni í bygninginum, fyri at gera rúmini minni og meira fjálg.

Fleirvirknisveggurin verður bygdur sum modul, har brúkarin kann velja hvørji modul og hvar í bygninginum tey skulu staðsetast. Dømi um modul síggjast á myndunum til høgru.



Klivi til tveir persónar



Klivi til ein persón



Klædnagoymsla



Opin goymsla



Skjótihurð



Opin goymsla á báðum síðum



Sansaveggur



Klintriveggur



Lukkað goymsla



Hurð og vindeyga



Vindeyga við borði og bonki



Sitihola



Garður og uppihaldsøki í búeindini / 3D frá skipanaruppskotinum

GARÐARNIR - HUGRÓ

Siðbundið verður japanski garðurin sniðgivin sambært japanskari estetiskari og filosofiskari hugsan um at finna hugró. Evni og tilfar skal vera upprunakent og máað náttúrligt evni verður valt framum nýtt og tilgjørt. Sambært japanskari hugsan, eru garðar og havar ein tilvísing til samanspælið millum náttúru og tíð, og ein áminning um menniskjans viðbreknu tilveru í tí størra náttúruhøpinum.

Í býlinginum skapa garðarnir eitt trygt og vart uttandura umhvørvi, ið eisini er sansastimbrandi. Garðarnir virka sum andahol í inniumhvørvinum og glasveggirnir tryggja at nokk av ljósi kemur inn í bygningin, uttan at virka áleypandi. Garðarnir bjóða fram møguleika fyri ymiskum virksemi, so sum blómugarði, urtagarði, uttandura vatnvirksemi og spæl. Fremsta endamál við garðunum er tó at skapa tær bestu umstøðurnar fyri at finna hugró.










Myndasamklipp, sansastimbrandi havar




Støðumynd
1:500


TEKNINGAR
ARK - KONTRAST



Flatmynd, stovuhædd
1:200




Flatmynd, 1. hædd
1:200




N


Flatmynd, kjallari
1:200




Framsíða suður 1:200




Framsíða vestur 1:200



Framsíða noður 1:200



Framsíða eystur 1:200



Heim fyri børn og ung við autismu
Kviggjartún, Argir

Matr. 56a

Grundstykki tilsamans: 7600 m2

Byggistig

Fermetrar: 900 m2
Netto byggistig er: 900 : 7600 = 12%

Nýtslustig

Fermetrar: 1170 m2
Nýtslustig er: 1170 : 7600 = 15%

Støðumynd, byggi- og nýtslustig,
1:500



Støðumynd, útbyggingarmøguleikar,
1:500

Útveggur


Timburklæðing
Timburlektir
Fjarstöðulistar
Vindpláta
Bjálving og timburstólpar
Dampsperra
Krossbjálving og timburstólpar
2 løg gips

Tekja

Flag
Takpapp
Bjálving
Undirtak
Gittarsperrur

Lendisgólv

Linoleum/vinyl
Betong
Dampsperra
Trýstføst bjálving
Skildur skervur



Longdarskurður, tilfarslýsing
1:100

Hæddarskilnaður

Linoleum/vinyl
Gólvundirlag
Gólvpláta
Undirsløg
Timburraftir
2 løg gips
Ljóðboylar
Loftskinnari
Gips/troldtekt loft

Ljóðveggur

2 løg gips
Stálstólpar
Bjálving
40 mm luftrúm
Stálstólpar
Bjálving
2 løg gips

Innveggur


2 løg gips
Stálstólpar
Bjálving
2 løg gips

Kjallaraútveggur

Betong
Bjálving
Puss (Dubbaplast undir jørð)

Niðurhongt loft

Stroppar
Skinnarasystem
Gips/Troldtekt loft



TILFAR

Innandura yvirflatur

Innveggir eru bygdir upp av stál/gips, dupult fyri ljóðbjálving.
Allir veggir eru í høvuðsheitum hvítir. Litseting verður innbúgvi. Allar hurðar vera hvítlakkeraðar.
Miðsetta elevatortorni verður staðstoypt. Uttaná verður tornið litsett í einum heitum betong liti í kontrast til hvítu veggjaflaturnar og hvítu troldtekt loftini.

Fast innbúgv, so sum litseting av skápshurðum og gardinum verður vald í samsvar við tørvin hjá børn og ungum við autismu. Eik laminat verður á fleirivirknisveggunum.

Loftini í búrúmum eru hvít Echophon loft, undantikið í durunum sum eru hvít niðurhongd troldtekt loft. Øll loft uttanfyri búrúm, í gongsøki, uppihaldsøkjum, køkum og virkisrúmum eru kløddd við hvítum troldtekt. Tey sekunderu rúmini, so sum vesir, goymslurúm o.a. hava sløtt gipsloft. Fríhæddin í størri uppihaldsrúmunum er 2,7 m. Í minnu hølunum, gongum, goymsluhølum o.s.fr. er fríhæddin 2,4 m. Í miðbygninginum er fríhæddin 2,5 m.

Gólv í búrúmum, uppihaldshølum og starvsfólkahølum verða áløgd linoleum. Í øllum vátrúmum og durum verður vinylgólv.

Sólavskerming. Mælt verður til at øll uppihaldsrúm hava sólavskermandi gardinur og at gardinur/persiennir í kamari er inni í vindeygunum. Einasta rúm sum skulu myrkaleggjast eru kømur, hædd verður tikin fyri hesum.

Fleksibilitetur er tryggjaður við at eingin skilaveggur er berandi. Allir útveggir og súlir eru berandi. Ímillum hetta spenna límtræsbjálkar. Tað ger at konstruktivt er bygningurin sera fleksibul.

Uttandura yvirflatur

Útveggir eru allir klæddir við slættum timburklædningi í ymsum breiddum, við transparent oljubeis viðgerð.

Tekjan er áløgd flag, við aluinndekningum ístaðinfyri vindsakeið og dekkbretti. Parkeringsplássið verður lagt við javnum halli móti vestri og álagt asfalt, kantað við 12 mm stál móti flisaálegging og grasi.

Vindeyguni eru hvít aluminium við trækarmi. Vindeyguni eru sett í svartar inndekningar sum ganga runt alt vindeyga. Vindeygu í ljósgørðum er eloxerað aluminium.

BYGNINGSLUTIR

Útveggir
Útveggir eru úr timbri við fylgjandi uppbygnað:

- 22 mm timburklædningur
- 38 x 56 mm lektir
- 12 mm fjarstøðulistar
- 9 mm vindpláta
- 195 mm berandi timburstólpar
- 195 mm bjálving
- Damsperra
- 45 mm krossbjálving
- 45 x 45 mm timbur
- 2 x 12,5 mm gipsplátur
- Kjallaraútveggir eru 200 mm betong, 150 mm bjálving og puss.

Innveggir

- Vanligir innveggir eru 120 mm gipsveggir við 70 mm stálstólpum við bjálving og 2 løg av 12,5 mm gips á báðum síðum
- Ljóðveggir eru 230 mm gipsveggir við 2 løgum av 12,5 mm gips, 70 mm stálstólpar við bjálving, 40 mm luftrúm, 70 mm stálstólpar við bjálving og 2 løgum av 12,5 mm gips
- Vátrúmsveggir hava 2 løg av vátrúmsgips og annars sama uppbygnað sum vanligir veggir

Tekja
Tekjan er uppbygd sum heit tekja:

- Flag
- Takpapp
- 200 mm trýstføst bjálving
- 18 mm tróðurplátir
- Gittarsperrur við dim. smb. verkfrøðingaprosjekt

Hæddarskilnaður
Hæddarskilnaðurin er timburkonstruktión við fylgjandi uppbygnað:

- Gólvyvirflata úr vinyl ella linoleum
- Ljóðdoyvandi gólvundirlag
- Gólvplátur
- Undirsløg úr timbur við bjálving
- Timburforskalling
- 2 løg av gips
- Loftuppbygnaður sum antin fastmonterað ella niðurhongt loft

Vindeygu og hurðar í útsíðum

- Aluminium vindeyga- og hurðaeind

Innhurðar

- Brandhurðar. So sum “Stable” hurðin hjá “Swedoor” við tilhoyrandi klassifisering.
- Ljóðhurðar (dB 40). So sum “T34” frá Dalco.
- Óklassaðar hurðar. So sum “Stable” hurðin hjá “Swedoor”
- Allar hurðar verða hvítar

Loft

- Loft í kømrum og stovu eru hvít Echophon loft
- Loft í durum í búeindum eru hvít troldtekt
- Loft í gongsøkjum og uppihaldsøkjum eru hvít troldtekt
- Loft í goymslurúmum, vesum o.t. Sløtt hvít gipsloft

Gólv

- Linoleum er í øllum rúmum uttan í vátrúmum – har verður vinyl.

ATKOMUVIÐURSKIFTI

Byggingin verður sniðgivin sambært kunngerðini um atkomuviðurskifti. Hetta merkir, at fólk við ymiskum tarni kunna nýta bygningarnar og ferðast runt í bygningunum á jøvnum føti við aðrir brúkarar

3 parkeringspláss verða til rørðsutarnaði avmerkt og so nær inngongdini sum møguligt.


Allar úthurðar og allar innhurðar eru min. 9M.

Í samband við flest allar innhurðarnar, er somuleiðis 50cm fríplàss á síðuni mótsætt hongslunum, har hurðin gongur ímóti tær. Gáttin er max. 2,5 cm høg. Vesi fyri rørðslutarnað er á stovuhædd.

TEKNINGAR
ARK - KONTRAST



Vinyl í ljósum liti



Betong




Svartur træklædningur




Flagtekja



Eik laminat



Ljóst linoleum



Brunaflatmynd, stovuhædd
1:200

BRUNAFRÁGREIÐING


Brunaviðgerðin verður sum útgangspunkt gjørd eftir BK17, flokka sum klassa 6. Stovnurin kemur sum útgangspunkt undir óhjálpin sovandi brúkari.

Bygningurin er býttur í tríggjar brunadeildir; Umlættingeindin, Virkiseindin (tvær hæddir) og Búeindin. Eitt brandskáp er í hvørjari eind, og hædd.

Bygningurin fer at hava automatiska ávaringarskipan og ABDL stýring av hurðum, portrum o.t.

Berandi konstruktiónir eru í høvuðsheitum límtræ og hava neyðuga brunatrekleika smbr. BK17. Útsíður eru klæddar við tilfari, ið brennur, t.e. ikki klassa A og ella klassa 1.
Innan eru veggir og loft klædd við klassa A ella klassa 1 tilfari. Gólvbelegningur er í minsta lagi sum klassa G tilfar.
Innbúgv í gongd og felagsøkjum, skulu hava lágt brandvirði, sum t.d. leðurstólar við stálbeinum. Gongu- og felagsøkir hava bókareolir o.t., ið økja um vandan fyri eldi. Ætlanin er at nýta klassa 1, Fundermax tilfar til reolirnar.

Tá verkætlanin er komin longri, skulu innsatsviðurskiftini hjá sløkkiliðnum fastleggjast. Men sum útgangspunkt, rokna vit við at innsatsurin verður frá atkomuvegnum. Tað slepst ikki runt bygningin við bilinum.




Brunaflatmynd, 1. hædd
1:200




Sititrappa uttanfyri Virkiseindina

TEKNINGAR
ARK - KONTRAST



Brunaflatmynd, kjallari
1:200



Stovuhædd, sperrur 3D

KONSTRUKTIÓNSFRÁGREIÐING

FYRITREYTIR
Nærverandi frágreiðing lýsir í stuttum grundarlagið fyri statisku útrokningunum og statisku skipanini í bygninginum.

DIMENSIONERINGSGRUNDALAG
DS/EN 1990
DS/EN 1991*
DS/EN 1992
DS/EN 1993

*Í sambandi við fastlegging av vindtrýsti, sbrt. DS/EN 1991, verður tó, sum vanligt er í Føroyum, brúkt eitt maksimala kvasistatiska karakteristiska vindtrýsti $w_{max,k}$ innan og uttan, sum er fastlagt á hendan hátt:

Í sambandi við stabilitet og styrki á berandi bygningslutum:

$$w_{max,k} = 1{,}6\ kN/m^2 \times c_{pe}$$

í sambandi við dimensionering av samlingum:

$$w_{max,k} = 1{,}9\ kN/m^2 \times c_{pe}$$

Faktorurin c_{pe} er formafaktorarnir uttan ella innan og verður fastlagdur sbrt. DS/EN 1991 – 1 – 4 DK NA.

Virðini á 1,6 kN/m² og 1,9 kN/m² svara til eina maksimala miðalvindferð á ávikavist 50 m/s og 55 m/s.

LASTIR
Lastirnar í ávirka bygningin eru, í høvuðsheitum, eginlastir, jørðtrýst, nýtslu- og natúrlastir (nátúrlastir: vindur og/ella kavi).

Eginlastir
Eginlastirnar verða fastlagdar, sbrt. krøvum í DS/EN 1991 - 1 – 1, t.e. útfrá teirri útroknaði eginlastini á innbygdu bygningslutunum, íroknað bæði berandi og ikki berandi bygningslutir. Eisini skal sbrt. DS/EN 1991 – 1-1 íroknast eginlastina, lastir frá permanentum maskinum, rørum, el- og rørinnstallatiónum.


Jørðtrýst
Roknað verður við vatnrøttum jørðtrýsti á stuðlaveggum móti lendi og veggum undir lendi.

Nýtslulastir
Nýtslulastirnar verða fastlagdar sbrt. DS/EN 1991 - 1 - 4, við tilhoyrandi donskum anneksi.

Vindlastir
Vindlastirnar verða fastlagdar, sum nevnt í parti 1.0.

Kavalastir
Kavalastirnar verða fastlagdar sbrt. DS/EN 1991 - 1 – 3, við tilhoyrandi donskum anneksi.

Lastkombinatiónir
Lastkombinatiónir, samansettar av omanfyrinevndu lastum, verða fastlagdar sbrt. DS/EN 1990, við tilhoyrandi donskum anneksi. Lastkombinatiónirnar, ið bygningurin og bygningslutirnir verða dimensioneraðir at klára, umfata bæði ymiskar lastkombinatiónir, í brot- og ólukkustøðu. Harumframt verður bygningurin og bygningslutirnir dimensioneraðir til at klára ymiskar lastkombinatiónir í nýtslustøðu.



Stovuhædd, sperrur
1:200

STATISK SKIPAN - BERANDI OG STABILISERANDI BYGNINGSLUTIR
Bygningurin er ein samanbygdur timburbygningur partvís í 2 hæddum. Berandi og stabiliserandi bygningslutir eru í høvuðsheitum úr timbur.


Niðanfyri standandi punkt lýsa í stuttum hvussu stabiliteturin í bygninginum verður tryggjaður.

Frágreiðingarnar í niðanfyristandandi punktum byggjur á metingar og á statiskar útrokningar av høvuðsbygningslutum og útsettum bygningslutum.

Lendi, strípu- og punktfundament
Staðstoypt strípu- og punktfundament úr jarnbetong verða á stabila trumlaða grótfyllu. Roknað verður við vanligari grótfyllu. Maksimalt trýst á fylluna verður 350 kN/m². Hetta verður tryggja við støddini á fundamentunum.

Berandi og stabiliserandi veggir
Berandi og stabiliserandi út- og skilaveggir, timbur klæddir við avstívandi plátum, verða í øllum bygninginum. Hesir koma at hvíla á strípufundamentunum, nevnd í pkt. 1. Veggirnir verða dimensioneraðir soleiðis at teir klára longdar- og tvørstabilitetin í bygninginum. Útveggirnir móti lendi, verða eisini dimensioneraðir til at upptaka jørðtrýst.

Gólvkonstruktiónir og takkonstruktión
Allar gólvkonstruktióni á lendi verða við 100 mm staðstoyptum betongdekki.
Ætlanin er at gera gólvið millum hæddirnar úr timbur. Gólvkonstruktiónin kemur at virka sum skiva og tryggja, at vatnrøttu lastirnar yvirførdar til staðstoyptu veggirnar.
Ongar avmarkingar eru til holstøddir í dekkunum, til ventilatión hita o.t.
Tekjan verður gjørd sum løtt konstruktión, við gittarsperrum, berandi límtræsbjálkum og krossifiner plátum. Hendan verður gjørd sum ein skiva, ið verður fest í stabiliserandi betongveggirnar.
Tekjan skal bera flagtekjuna. Vektin av tekjuni er við til at fáa tyngd í bygningin og verður brúkt sum partur av stabiliseringini.



Støðumynd, leiðingar
1:300

Teknlýsing:

- Spillvatn leiðing
- Verandi spillvatn leiðing
- Regnvatn leiðing
- Brúnt vatn
- Dren leiðing
- Brunnar
- Feitútskiljari
- Rottangi

LEIÐINGAR Í LENDI

Á økinum har ið Heimið skal byggjast kann roknast við at drenvatn skal leiðast runt um bygningin.
Regnvatnsleiðingar frá takvatnsbrunnum, ristum v.m. kunnu leiðast í gil hóskandi stað í lendinum ella í kommunala regnvatnsleiðing.
Ein nøkandi rottangi skal dimensjonerast til frárensl frá vesum, hondvøskum v.m. Kloakkeiðingar í jørð eru evnaðar úr Ultra PP, SN8.

Nýggja kloakkleiðingin verður bundin í verandi kloakkleiðing tætt við vegin við Kvíggjartún.
Útlufting frá leiðingum verður førd yvir tak.


Frárenningarleiðingar verða dimensioneraðir eftir Dansk Standard 432.
Um krav er frá kommununi til feittútskiljari, skal hesin dimensjonerast til tørvin.
Til vatnveiting inn í bygninginum verður løgd ø75 mm PE-leiðing frá kommunalu vatnveitingini í Glyvursvegnum. Leiðingin verður førd oman gjøgnum lendi og inn í tøknirúm í nýggja kjallar.

SANITETSARBEIÐI

Frárenningarleiðingar:
Allar sanitetseindir verða íbundnar í muffur á kloakkleiðingum við lendisgólv.
Uppsettar verða reinsilúkur á rør beint omanfyri lendisgólv.
Útluftingar frá møguligum fallstammum verða førdar yvir tak.

Brúksvatnsleiðingar:
Ringrásskipanin til tað heita vatnið verður gjørd soleiðis, at hitin ongastaðni er avkøldur meiri enn uml. 5 °C í høvuðsleiðingunum og at vatnið er frammi við tappstøðini innanfyri 10 sekund, eftir at skrúvað er frá. Uppsettir verða hitastýrdir ventilar við enda á heittvatnsleiðingum, sum opna um hitin í leiðingunum fellur.

Brunaskáp:
Uppsett verða vatnfyltir slanguvindarar, sum fabr. NOHA, við 30 m ¾" slangu.
Slanguvindarar verða uppsettir eftir ávísing í góðkendum brunaplani.



Stovuhædd, gólvhiti
1:200

Teknlýsing:

Gólvhiti
Hitapumpa
Luft/vatn sum CTC Exotic

HITAVERKSARBEIÐI

Í tøknirúminum verður uppsett ein luft/vatn hitapumpuskipan ið verður íbundin hita og brúksvatn. Hølini í nýggja býlinginum verða upphitaði við gólvhita.


Frá tøknirúmi verða lagdar hitaverksleiðingar til fordeilaraskáp á lendis- og 1. hædd. Úr skápum verða løgd gólvhita slangur til øll rúm í bygninginum. Hitin verður stillaður við rúmfølara í einstøku hølunum. Longd á sloyfum til gólvhita verður ongastaðni longri enn 85 m. Og slangurnar verða samlaðar í fordeilaraskápum, við telestatum á returum.

Framrenningarhitin kann verður stýrdur eftir uttandura hitanum og hitatørvinum í bygninginum. Uppsett verður uttandura følari.
Allar pumpur verða tørvstýrdar og bundnar í stýriskipan.

Hitaverksleiðingar:
Høvuðleiðingar eru sum svørt jarnrør ella alupex.
Har leiðingar verða førdar ígjøgnum skilaveggir, verða uppsettir Karfa-búsningar.
Leiðingarnar verða lagdar, soleiðis at ekspansión kann upptakast í rørskipanini.
Gólvhitaslangur eru PEX-rør við ilt-verju.
Hita rúmfølarar eru í øllum rúmum.
Gólvhitaskáp verða staðsett í veggir hóskandi støð í bygninginum.
Umráðandi er, at hita- og brúksvatnrør verða "potentiale" útlíknað í elarbeiðstøkuni.


Innregulering:
Uppsettir verða innreguleringsventilar, so lætt er at innregulera skipanina, og tryggast kann, at dimensioneraða vatnnøgdin kemur til øll rúm. Innreguleringsventilar eru sum fabr. TA, typa STA. Innreguleringin fer fram við CBI-innreguleringstóli.
Hitaverkið verður dimensionerað eftir DS 469. Hitatørvurin eftir DS 428.

Bjálving:
Allar hitaverksleiðingar verða bjálvaðar eftir DS-452, bjálvingarklassi 3 og 4.
Í tøknirúmi verða leiðingarnar bjálvaðar við Rockwool Unversalskálum við alufolie. Hereftir verða leiðingarnar klæddar við kløtzellørifti, sum verður smurt tvær ferðir við límvatni og síðani málað ella klæddar við plast. Á allar leiðingar í tøknirúmum verða merkir og pílar settir á vísandi til streymrætning.
Leiðingar, sum liggja í skaktum og omanfyri niðurhongd loft, verða bjálvaðar við Rockwool Universalskálum.
Allir ventilar verða veittir við bjálvingarkappa.



1. hædd, gólvhiti
1:200

1. hædd, gólvhiti
1:200



Stovuhædd, ventilatión
1:200

Teknlýsing:

- Innblásing
- Útsúgving
- Inntak
- Avkast

Armatur

Komfort loftarmatur
Komfort vegg armatur
Kontrolventilar í loft

Ventilatiónsverkið / Ventilator

VE01 sum VEX250
VE02 sum VEX250
VE03 sum VEX250

Komponent, Spjell, Ljóðfella oa.

VAV til felagsrúm
Ljóðfellir inn til øll rúm

VENTILATIÓNSARBEIÐI

Fyriskipanir:
Ventilasjónsskipanin verður gjørd sambært lógum, reglugerðum, standardum, vegleiðing-um og kunngerðum, ið er galdandi fyri hetta arbeiði.

DS 428, "DIF's norm for brandtekniske foranstaltninger ved ventilationssystemer",

DS 447, "DIF's norm for ventilationsanlæg"

DS 468, "DIF's norm for "Automatiske reguleringssystemer til VVS-tekniske anlæg",


Og annars sambært vegleiðingum frá veitarum vm.

Komfortventilatión:
Ventilatiónsverk verður sett upp í tey trý tøknirúminum í kjallara. Tey flestu rúmini verða ventileraði við innblásing og útsúgving. Inntak- og Avkastsristir lagdar í útvegg á tøknirúmum. Víst verður til BK17 um krav til luftskifti í rúmum. Í hølum har nógv fólk kunnu møtast verður luftnøgdin tørvstýrd.


Køksventilatión:
Eymhettur eru ikki við í hesari arbeiðstøku, men verða veittar av øðrum arbeiðstakara. Kanalir v.m. frá eymhettum og yvir tak ella útvegg, eru við í hesari arbeiðstøku. Møguligt er at binda útsúgving frá eymhettum til komfortventilatiónina, ella at tær verða veittar við motori við avkast út í vegg. Útsúgving frá eymhettum verður stýrd við on/off knøttum.

Kontrollventilatión:
Kontrollventilatiónin er partur av komfortventilatiónini.

Brunaskipan:
Uppset verður ein sentral stýriskipan í tøknirúm til brunaspjell og følarar.
Tal av brunaspjellum er verða endaliga ásett, tá brunaplanur er góðkendur



1. hædd, ventilatión
1:200



Tvørskurður 1, ventilatiónsprinsip
1:200


AUTOMATIÓNSARBEIÐI (CTS)

Uppsett verður fullfíggjað stýrings- og stillingsútgerð til allar hita-, heittvatn- og ventilatións- og brunaskipan. Føringsvegir verða samskipaðir við el arbeiðstøkuna.


Skipanin verður uppsett á hóskandi stað og allir føringsvegir verða samskipaðir við el-arbeiðstøkuna.

DS 468, "DIF's norm for "Automatiske reguleringssystemer til VVS-tekniske anlæg",

DIF norm fyri Veikstreymsintallasjónir, DS460 og SBI-anvísingar til stýringsútgerð



Tvørskurður 2, ventilatiónsprinsip
1:200




Teknlýsing:

- : Hiti fram
- : Hiti aftur
- : Signalkaðal
- : Kalt vatn
- : Heitt vatn
- : Heitt sirk.
- : Kúluventilur
- : 3-veg motorventilur
- : Stillingsventilur
- : Kontraventilur
- : Trygdarventilur
- : Termometur
- : Pumpa
- RF : Rúmfølari
- EL : El-orkmátari

Rúmfølarar kunn veitast sum tráðleys skipan ella tráða

Hitaskipan, stýridiagram




Ventilatión, stýridiagram

Teknlýsing:

Vent 01:	Ventilator - innblæsing		: Luft út
Vent 02:	Ventilator - útsúgving		: Luft inn
TS:	Kanalfølari/minimumsfølari		: Hitaverksvatn fram
TS70:	Brandtermostatur, stillaður til +70 °C		: Hitaverksvatn aftur
FV:	Filturvakt		: Stýrikaðal stýriskipan
SM:	VAV-spjell - Pascal skipan		
BS:	Brunaspjell		: Stýrikaðal brunaskipan
KF:	Kanalfølari		: Motorventilur
RÚ:	Rúmfølari		: Reguleringsventilur
	: Termometur		
	: Pumpa		

Rúmfølarar kunn veitast sum tráðleys skipan ella tráða



Stovuhædd, føringsvegir
1:200

ALMENNAR ÁVÍSINGAR VIÐVÍKJANDI EL-ARBEIÐUM

Innandura el-innleggingarnar verða framdar samsvarandi hesum krøvunum:

1. Byggiskránni
2. Føroysku el-lóggávuni
3. Treytum frá SEV
4. Sterkstreymsreglugerðum, herundir DS/HD 60364-røðini
5. DS/EN-standardum fyri ljósskipanir
6. Galdandi kunngerðum um brunaverju og brunatrygd. Herundir viðkomandi rætningslinjur og vegleiðingar frá DBI
7. Galdandi kunngerðum frá Arbeiðseftirlitinum
8. Føroysku byggikunngerðini BK17 – íroknað møgulig ískoyti
9. Nevndum vegleiðingum frá F.R.I. og ELFO

Uttandura el-innleggingar verða framdar samsvarandi hesum krøvunum:

10. Hondbókum og reglugerðum frá Vejdirektoratet.

Um mótstríð er millum tað her nevnda, og krøv sum byggiharrin hevur sett í kravfestingunum, hava krøvini sett av byggiharranum størri raðfesting, uttan so at talan er um krøv ið viðvíkja el-trygdina.

TILFAR

Alt tilfar ið brúkt verður, er CE-merkt. El-lutir og skipanir ið ikki er CE-merkt, verður ikki tilsett el-innleggingina.

Avbrótaratilfar verður av slagnum Fuga frá LK.

Harðføri og IP-flokkur verður valt samsvarandi umhvørvinum har tað verður uppsett.

Allir kaðlar verða halogen og PVC-fríðir.

STIKKLEIÐING

Frá skápi ið verður ávíst av SEV, verður løgd ein stikkleiðing, ið verður íbundin høvuðstalvuna. Støða til stødd á stikkleiðing og stikkleiðingarsikringum, verður tikin eftir at tað er greitt, hvat samlaða lastin verður fyri bygningin.
Frá høvuðstalvuni verða høvuðskaðar lagdir til undirtalvurnar.

TALVUR

Í bygninginum verður ein høvuðstalva og tvær bólkatalvur (undirtalvu), soleiðis at ein talva er í hvørjari høvuðseind. Høvuðstalvan verður uppsett í talvurúm, ímeðan bólkatalvurnar verða uppsettar í talvurúm ella skáp. Skipanir, so sum ventilatiónsskipanir, stórkøkur og ljósskipanir úti, verða veittar úr høvuðstalvuni.


Høvuðstalvan verður plátukapslað á gólvsokli, og staðsett soleiði, at tað ber til at vaksa um hana um neyðugt. Talvan verður veitt við inngangsfelti og avbrótara, plássi til SEV kWh-mátara við tilhoyrandi streymtransformarum, feilstreym- og bólkaavbrótarum/verjum, stýringum, kaðalfeltum og jørðskinnarum skeltum, bóklingi við tekningum, diagrammum og øðrum viðkomandi upplýsingum og frágreiðingum og tøkum plássi, sum fyriskrivað í byggiskránni.

Bólkatalvurnar verða sum UG frá LK, við feilstreym- og bólkaavbrótarum/verjum.
No-break ella shortbreak skipanir eru ikki íroknaðar el-innleggingarnar. El-talvurnar og bólkabýtið verður tó gjørt soleiðis, at el-innleggingarnar eru fyrireikaðar til slíkar skipanir.


JØRÐINGSSKIPAN

Í bygninginum verður gjørd ein jørðjavningarskipan, samsvarandi krøvum í Sterkstreymsreglugerðini. Skipanin verður gjørd við tveimum elektrodum. Onnur til verjujørð, og hin driftsjørðin, tøk til skipanir ið krvja sjálvstøðuga driftsjørð.
Í bygninginum verður lagdur ein blankur 1×25mm² Cu-jørðleiðari, við einari passandi nøgd av jørðjavningar skinnarum (plintum) ámonteraðum. Hesin jørðleiðarin verður t.d. lagdur eftir kaðalstigum úr leiðandi tilfari. El-føringsvegir úr leiðandi tilfari, metalllutir ið koma inn í bygningin, HVS- og ventilatiónsskipanir, gjøgnumgangandi bygningslutir úr metali og armering í lættbetongi, betongi og pussi, verður bundi í hesar jørðjavningar skinnararnar.

Allir sterkstreymskaðalar, uttan stikkleiðingskaðalin, verða veittir við jørðleiðarum, ið verða íbundnir jørðklemmur. Kaðlar, sum verða lagdir frá talvunum, verða bundnir í jørðskinnaran í talvuni teir verða lagdir frá.



1. hædd, føringsvegir
1:200



Kjallari, føringsvegir og talvur
1:200

KAÐALFØRINGSVEGIR
Kaðalføringsvegir til el-innleggingarnar verða skipaðir við innleggingarrennum og kaðalstigum í bygninginum og við rørum í lendinum.

Yvir niðurhongdu loftunum í gongsøkjunum, verða uppsettur kaðalstigar, ið koma at virka sum ein samanhangandi høvuðsføringsvegur gjøgnum bygningin. Stigin verður soleiðis, at kaðlar til ávikavist sterkstreym, veikstreym, net og maskinútbúnað, kunnu liggja hvør sær.

Við arbeiðspláss og í starvsfólkarúmum har fleiri stikkontaktir og netstikk eru samlaði, verða uppsettar innlegginarrennur.

Føringsvegirnir verða dimensioneraðir soleiðis, at tað verður nakað av tøkum plássi í teimum, eftir at innleggingin er liðug.

Allar gjøgnumføringar í veggir og dekk, ið verða gjørdar til el-innleggingarnar, verða tettar mótvegis bruna, ljóð og vætu.

LJÓSINNLEGGINGAR
Ljósinnleggingin verður skipa eftir nýtsluni, og soleiðis at tey krøvini sum Sterkstreymsreglugerðin setur til eitt nú ljós í felagsøkjum og rýmingarleiðum, verða fylgd.

Í felagsøkjum, gongsøkjum og skrivstovum, verður ljósið gjørt við dagsljósstýringum. Annað ljós verður stýrt við rørslu-/PIR-følarum og vanligum avbrótarum.
Tendringar og ljósstýringar verða skipaðar eftir hvussu bygningurin verður brúktur, og við atlitið til búfólk við autismu og at orkunýtslan hjá ljósarmaturunum ikki verður størri enn neyðugt.
Ljósarmaturini í og uttanum bygningin verða vald soleiðs, at góðskan er í samsvar við umhvørvi og soleiðis at útsjónd er í samsvar við japanska garðin og arkitektoniska stílin annars.

Viðurskiftir ið eru avgerðandi fyri hvørji ljósarmatur verða vald, er teirra umhvørvislast, virkningsgrad, livitíð og hvussu viðlíkahaldsvinarlig ljósarmaturini eru. Har ljósarmaturini verða ísett niðurhongd loft, verða tey eisini vald eftir slagnum av niðurhongdum loftum.
Yvirhøvur verða ljósarmatur, lampur og pendlar í bygninginum við LED-ljóskeldum.
Neyð- og panikkljós verða samsvarandi brunastrategiðini fyri bygningin. Neyðstreymur til hesi ljósini verður veittur frá battaríðum úti í armaturunum.

KRAFTINNLEGGINGAR - BYGNINGUR
Í bygninginum verður uppsett ein passandi nøgd av vanligum stikkkontaktum, 230V. Herundir reingerðarstikkkontaktir, ið verða uppsettar soleiðis at í størri rúmum er fjarstøðan millum hvørjar tvær reingerðarstikkontaktir ikki er størri enn 10 metrar. Í búrúmum verður nøgdin á stikkontaktum samsvarandi krøvum til sethús. Um Landsverk hava serstakar ásetingar til nøgd og slag av stikkontaktum við arbeiðspláss/skrivstovupláss verða hesar fulgdar.

Í tøknirúmum og á øðrum hóskandi støðum, verða tað umframt vanligar 230V-stikkkontaktir, eisini uppsettar tekniskar stikkkontaktir, 3×400V.
Umframt tøku stikkontaktirnar, verður kraft løgd til alla leysa- og fasta útgerð og tól, so sum hvítvørur, køkstól, venjingarmaskinum og verkstaðsmaskinu sum tær á Virkni.

KRAFTINNLEGGINGAR - HVS- OG VENTILATIÓNSSKIPANIR
Kraftveitingar verða lagdar til tær skipanirnar sum verða í bygninginum. Herundir hitaskipan og ventilatiónsskipanir. Veitingarkaðalarnir til tær størru skipanirnar enda í trygdaravbrótarum, sum verður markamótið millum el- og HVS-innleggingarnar. Tvs. masrkamót mótvegis skipanartalvum og stýrikassum við eftirfylgjandi kaðalum og lutum.

NET-INNLEGGINGAR
Veitt verður eitt dátunet við fastnetstikkum við arbeiðsstøðir, routarar, maskinur, skipanir og hvat annars krevur fastnet samband. Kervi verður á CAT6-støði og roynt í mun til 250Mb-ferð, við hartil egnaðum mátitólum.

Í stórum umfatar netið stikkleiðingar frá FT-Net, X-felt rackskáp við tilhoyrandi útgerð og UTP-stikk runt um í bygninginum, við koparsambondum til X-feltið.

X-feltskápið verður plasera soleiðis at rúmið tað verðir í, kann læsast fyri óviðkomandi.
Roknast verður ikki við at arbeiðstøkan fevnir um aktiva útgerð.

RADIO- OG SJÓNVARPSSKIPAN
Til dátuflutning frá radio- og sjónvarpsmóttakara (aktiv útgerð!), verður antennuskipanin í bygninginum gjørd sum ein partur av dátukervinum. Tvs. at RJ45-stikk verða uppsett har tørvur verðu mettur at koma at verða á antennustikkum.

LÁSASKIPAN
Til bygningin verður veitt ein veitast ein Integra 32 skipani frá Einar Mikkelsen. Skipanin veður gjørd við støði í disponeringini av bygninginum. Tvs. hvussu ferðast verður í bygninginum, hvussu bygningurin verður uppdeildur í sonur, og hvussu trygg/lokaði tey ymisku rúmini og økini skulu verða.

Kraft og netsamband verður lagt til skipanina, samsvarandi tørvi upplýstur av Einar Mikkelsen.

SJÁLVVIRKANDI BRUNAÁVARINGARSKIPAN (ABA OG ABDL)
Í bygninginum verður uppsett ein ABA-skipan, umframt ABDL-skipanir á tær hurðarnar sum krevja tað.
Við miðstøð (sentralur), brunavarnarum (brandmeldarum), brunatrýstum, lúrum og sjálvvirkandi afturlatingarhurðum (ABDL) o.ø., verður skipanin gjørd samsvarandi krøvum í brunastrategiðini fyri bygningin, og soleiðis at hon verður myndugleikagóðkend.
Frá miðstøðini verður telefonsamband við Brandstøðina.



Bylingurin sæddur frá gøtuni / 3D frá skipanaruppskotinum

LEIÐREGLUR

Burðardygd og tilfar
Arbeitt verður framm ímóti at nýta burðardygd og haldfør tilfar til býlingin. Konstruktiónin er ein timburkonstruktión við timburklædningi, og tekjan úr føroyskum flagi. Fundamentið er gjørt av betong, og vindeyguni av aluminium og timbur.
Samstundis verður nýtt grøn orka, í hesum føri luft/vatn hitapumpur.

Inniumhvørvi
Fyri at sikra eitt heilsugott inniumhvørvi, verður mekanisk ventilatión staðsett kring allan býlingin. Hetta við støði í galdandi normum og standardum.

Rúm
Støddin á rúmi hevur týdning fyri børn og ung við autismu. Ov stór rúm kunnu kennast áleypandi og tískil er dentur lagdur á at rúmini eru passalig í mun til ymisku virknisendamálini. Kømurini eru passalig til støddar og einføld í sniði. Tey størru felagsøkini kunnu deilast upp í tveir partar við fleirvirknisveggi. Gongin, Heimrustin, er staðsett í miðlonini, ið er snúðningsdepilin í býlinginum. Gongin í Heimrustini er einasta longri gongin í býlinginum og hon er skiftisøki millum bústaðarlonina, virknislonina og umlættingarlonina. Búfólkini kunnu verða fyri seg sjálvan í einum bústaðarumhvørvi, uttan at órógvast óneyðugt av øðrum virksemi á stovninum og umvent.

Møblering og litir
Menniskju við autismu hava ofta torført við at skilja millum sansaárin og verða tí lætt strongd av rúmum við nógvum møblum og pyntilutum. Dentur er tískil lagdur á at skipa innrættingina í rúmunum einfalda og eftir tørvi. Til ber at skapa hugna við bleytum møblum, litum og dimmum ljósi. Rúmini skulu heldur ikki hava ov sterkar litir. Litir er tó hóskandi at brúka til at uppmerkja ymisku økini í bygninginum við. Búfólkið hevur egnar møblar við, meðan kømurini í umlættingini hava fast innbúgv.

Ljóð- og ljósviðurskifti
Ljóð og ljós hava stóra ávirkan á miðsavnanina hjá menniskjum við autismu. Tískil er týdningarmikið at ljóðburðurin í bygninginum er passaligur og virknishóskandi í ymisku rúmunum. Allur bygningurin skal hava ljóðloft, gólvini skulu klæðast við linoleum, umframt vinyl í vátrúmum, , ið er ljóðdoyvandi, og íbúðirnar skulu hava ljóðveggir. Møguligt skal verða at stilla ljós og hita í ymisku rúmunum eftir tørvi. Kømurini í búeindini skulu hava innbygdar myrkaleggingargardinur. í vindeygunum. Hugsanin við at nýta flagtekju, er somuleiðis at hon er ljóðdoyvandi, serliga um hugsað verður um avfall.

"Buildings designed with the index in mind minimize the sensory input that can overwhelm children with autism, such as buzzing noises from lighting that others might not notice. They provide a smooth sequence of transitions from room to room, to enable the preservation of reassuring daily routines. And they allow for "escape spaces" where children who are feeling overwhelmed can find a "sensory haven."

Sarah Goodyear, Citylab



Gøtan inni í Heimrustini / 3D frá skipanaruppskotinum

HEIMRUSTIN - VIRKIS- OG STARVSFÓLKAEIND

Høvuðsinngongd
Høvuðsinngongdin er staðsett í snúningsdeplinum á bygninginum, nevniliga heimrustini. Inngongdin strekkir seg yvir tvær hæddir, har fleirivirkisveggurin saman við trappuni, er við til at skapa samanhang ímillum hæddirnar.
Beint sum komið verður inn í bygningin, hava starvsfólk, búfólk og borgarar møguleika at taka skógvarnar av og seta teir í eina skógvahill, sum er partur av fleirivirknisvegginum. Borgarirnir, sum skulu í frítíðarskúla, hanga jakkarnar í egnu klædnagoymslu á fyrstu hædd.
Høvuðsinngongdin er fyrst og fremst ætlað starvsfólki, brúkarunum, ið skulu í frítíðarskúlan, foreldur sum skulu til samtalu ella til vøruavhending.

Starvsfólkaeindin
Kontórið hjá leiðaranum er staðsett nær høvuðsinngondina. Starvsfólkarúm við umklæðing og vesi er eisini staðsett her, soleiðis at starvsfólkini hava møguleika at møtast miðskeiðis í býlinginum.

Samtalurúm
Samtalurúmið er eitt rúm har starvsfólk hava møguleika at tosa við foreldur og børn, ið eru tilknýtt býlinginum. Rúmið er staðsett á fyrstu hædd, tætt uppá trappurnar.

Gongdir
Gongin í Heimrustini, eisini nevnd Gøtan, er sniðgivin sum eitt dupulthøgt rúm við einum fleirvirknisveggi og einum garði á einari síðu. Í fleirvirknisvegginum er goymsla, klintriveggur, vindeygu og ein skjótihurð ið førir inn í venjingarhølið, ið eisini kann nýtast sum eitt opið rúm út til Gøtuna.
Frá Gøtuni sæst niðan á eina brúgv, ið førir borgarar og starvsfólk frá klædnagoymsluni og inn í uppihaldsrúmið á fyrstu hædd.

Venjingarhølið
Frá gongdini er beinleiðis atkoma inn í venjingarhølið, ið bæði kann nýtast sum venjingarhølið, spælirúm og uppihaldsrúm fyri bæði búfólkunum og borgarunum, ið nýta bygningin.

Sansarúm og vatnavirksemi
Rúmini liggja miðskeiðis í bygninginum, tætt uppá høvuðsinngongdina, búeindina og umlættingareindina, soleiðis at øll í býlinginum lættliga kunnu nýta hølini. Til vatnavirksemið tilhoyrir ein sansabrúsa, samstundis sum at rúmið verður innrættað við baðikar, brúsu og einum vesi.
Sansarúmið er eitt minnið rúm sum inniheldur eina vatnsong, ein massagustól, eitt interaktivt kúlubað og ljóð- og ljóstøkni ið kann stimbra brúkaran í hesum rúmi. Eitt kagahol er staðsett frá gongini, men annars er rúmið, tí ber væl til at arbeiða við ljósinum í hesum rúmi.

Verkstaður og ítrivsrúm
Verkstaðurin er staðsettur á stovuhædd við útsýni ímóti Tórshavn og spæliplássinum uttanfyri. Ítrivsrúmið er harafturímóti staðsett á fyrstu hædd. Á verkstaðnum og ítrivsrúminum kunnu brúkarinir takast við eitt hvørt handarligt.

Teldurúm
Teldurúmið er innrættað við seks teldum. Her kunnu brúkarir, ið dáma væl at fáast við teldur og telduspæl. Teldurúmið er staðsett við uppihaldsrúmið á fyrstu hædd.

Felags goymsla og hjallur
Hjallurin og felagsgoymslan eru staðsett tætt við høvuðsinngongdina. Her kemur vøran beinleiðis inn, og verður síðani heintað av starvsfólki úr teimum trimum køkunum, ið eru í húsinum.
Í felagsgoymsluni er plass fyri frystiboks og fjargoymslu av mati, vesipappíri og líknandi. Umframt hesa goymslu, eru goymslur staðsettar við allar køkar.

Vesir
Í virkiseindini eru trý vesir. Eitt rørslutarnað vesi á stovuhædd og tvey vesir á fyrstu hædd.

Køkur og uppihald
Køkurin liggur á fyrstu hædd við góðum útsýni yvir Tórshavn og Nólsoy. Út frá køkinum liggur ein goymsla, ið kann nýtast sum eyka goymsla í býlinginum.
Uppihaldi spjaðir seg yvir eitt størri øki, ið kann býtast upp í trý smærri rúm. Í uppihaldsøkinum eru fleirivirknisveggirnir við til at skapa ymisk rúm í rúminum.

Vásakøkur
Útyvir køkin inni í eindini, er ein felags vásakøkur staðsettur uttanfyri, ímillum búeindina og virkiseindina. Her kann fiskur, grind og annað viðgerðast.

Tøkni rúm
Tøkni rúmið er býtt upp í trý tøknirúm, ið eru staðsett í kjallara. Eitt undir búeindini, eitt undir umlættingareindini og eitt undir virkiseindini.

Uttandura goymslurúm
Goymslurúm til uttandura leikur og súkklur er staðsett undir virkiseindini.

Ruskrúm
Ruskrúmið er staðsett nær høvuðsinngongina soleiðis at allir køkar í býlinginum hava atgong til rúmið, samstundis við at tað liggur tætt við vegin.



Kamar í umlættingareindini / 3D frá skipanaruppskotinum

EYSTARI BÝLINGUR - BÚEINDIN

Durur og klædnagoymsla
Atkoma til Eystara Býling er ígjøgnum eitt grønt skot og inn í ein dur og klædnagoymslu, ið er staðsett sum ein leinging av Gøtuni í virkiseindini. Hetta gevur borgarunum og starvsfólkunum møguleika at velja ímillum at nýta høvuðsinngongdina ella beinleiðis inngongdina í búeindina.
Í durinum er eitt skáp til hvønn borgara.

Køkur
Køkurin er staðsettur við útsýni út á felags spæliplássið. Í køkinum er nógv goymslupláss í skápum og skuffum. Køkurin hevur beinleiðis atgongd út í uppihaldsøkið, ella Eystara Tún.

Uppihald
Uppihaldið, eisini nevnt Eystara Tún, snúðir seg rundanum garðin, og kann býtast upp í tvey rúm, um tørvur er á tí. Frá uppihaldsøkinum er møguleiki at koma út á felagsspæliplássið og sansagarðin.

Gongd
Gongin byggir seg rundanum garðin, og gerst, saman fleirviknisvegginum, partur av uppihaldsøkinum. Í hesum økinum er lukkað og opin goymsla og sitiklivi partur av fleirivirknisvegginum.

Vaktrúm
Vaktrúmið er staðsett miðskeiðis í búeindini, og inniheldur eina sovusofu, eitt skrivaraborð, eitt sjónvarp, skáp og eitt vesi/baðirúm.
Frá vaktrúminum er beinleiðis atgongd úr býlinginum.

Íbúðir
Í búeindini eru seks íbúðir, sum allar eru innrættaðar við einum lítlum duri við klædnagoymslu, einum vesi við brúsu, eini stovu og einum lítlum kamari.
Í kamarinum er plássi til trý klædnaskáp, eini einkultsong og einum seingjarborði.
Í stovuni er plássi fyri einari tveymans-sofu, einum sofaborði, einum lítlum skrivaraborði og sjónvarpi. Úr stovuni er atgongd út á egnu altan.
Í hvørjari íbúð er eitt sitivindeyga, ið gevur borgarunum eitt stað at sita í egnum tonkum, hyggja út ella lesa eina bók. Vindeyga gevur eisini møguleika fyri einum eyka sessi í íbúðini.
Í búeindini hevur búfólki møguleika at taka egnar møblar við.

Goymsla og vaskirúm
Ein minni goymsla og eitt vaskirúm er eisini tilknýtt búeindini. Vaskirúmið er lagt soleiðis at tað er lætt hjá starvsfólki at vaska seingjarklæði og klæði hjá búfólkinum í búeindini.

VESTARI BÝLINGUR - UMLÆTTINGAREINDIN

Durur og klædnagoymsla
Atkoma til Vestara Býling er ígjøgnum eitt grønt skot og inn í ein dur og klædnagoymslu, ið líka sum í Eystara Býlingini, er staðsett sum ein leinging av Gøtuni í virkiseindini. Í durinum er eitt skáp til hvønn borgara.

Køkur
Køkurin er staðsettur við útsýni yvir Tórshavn. Í køkinum er nógv goymslupláss í skápum og skuffum. Køkurin hevur beinleiðis atgongd út í uppihaldsøkið, ella Vestara Tún.

Uppihald
Uppihaldið, eisini nevnt Vestara Tún, snúðir seg rundanum garðin, og kann býtast upp í tvey rúm, um tørvur er á tí. Frá uppihaldsøkinum er møguleiki at koma út í tann lítla sansagarðin, og á eina uppihaldstrappu og víðari út á felagsspæliplássið.

Gongd
Gongin byggir seg rundanum garðin og gerst, saman við fleirviknisvegginum, partur av uppihaldsøkinum. Í hesum økinum er lukkað og opin goymsla og sitiklivi partur av fleirivirknisvegginum.

Vaktrúm
Vaktrúmið er staðsett miðskeiðis í búeindini, og inniheldur eina sovusofu, eitt skrivaraborð, eitt sjónvarp, skáp og eitt vesi/baðirúm.
Frá vaktrúminum er beinleiðis atgongd úr býlinginum.

Íbúðir
Í umlættingareindini eru seks íbúðir, sum allar eru innrættaðar við einum lítlum duri við klædnagoymslu, einum vesi við brúsu og einum kamari/stovu.
Í kamarinum/stovuni er møguleiki fyri at gera innbygdar møblar, soleiðis at brúkarin bert skal hava eitt kuffert við, tá ið hann kemur.
Í kamarinum er plássi til eina einkultsong, eini tveymannssofu, einum sofaborði, einum lítlum skrivaraborði og einum sjónvarpi. Úr íbúðini er atgongd út á egnu altan.
Í hvørjari íbúð er eitt sitivindeyga, ið gevur borgarunum eitt stað at sita í egnum tonkum, hyggja út ella lesa eina bók. Vindeyga gevur eisini møguleika fyri einum eyka sessi í íbúðini.

Goymsla og vaskirúm
Tríggjar minni goymslur og eitt vaskirúm er eisini tilknýtt umlættingareindini. Vaskirúmið er lagt soleiðis at tað er lætt hjá starvsfólki at vaska seingjarklæði og klæði hjá brúkarunum í búeindini.



Bygningur í lendi - luftmynd / 3D frá skipanaruppskotinum

Byggiánari: Almannamálaráðið
Byggiharri: Landsverk
Ráðgevar: Kontrast

Dagfesting: 29. Mai. 2019

Nr:	% Býti	Evni	Kostnaður
		ARK og KON	
01	53,4	Timbur og snikkara arbeiði	12.560.190,00
02	14,4	Jørð- og betongarbeiði	3.386.400,00
03	1,5	Málara arbeiði	352.860,00
04	2,7	Gólv arbeiði	645.200,00
05	1,7	Uttanumøki	410.650,00
			17.355.300,00
06	9,4	EL- arbeiði	2.220.000,00
07	16,8	Hvs arbeiði	3.960.000,00
			6.180.000,00
		Hondverkaraútreiðslur	**23.535.300,00**
	5,0%	Óvissa	1.176.765,00
		Samlaður kostnaður, uttan MVG.	**24.712.065,00**
		MVG.	6.178.016,25
		Samlaður kostnaður við MVG.	**30.890.081,25**

Fermetur kostnaður íroknað óvist, uttan MVG: **23.761,60 kr.**

KONTRAST
Byggilist & byggifræði

CONSULT

LBF Ráðgevandi verkfræðingar